# TILTØK

**Gudstænastur**
**Týskvøldið 7. februar**
***Christianskirkjan:*** kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta, altarg., Hans Eiler Hammer

**Hóskvøldið 9. februar**
Sambýlið við Bøgøtu: kl. 19.30, Niels Pauli Danielsen

**6. s. e. trettanda**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein, talvan gongur fyri KFUK í Havn
***Vesturkirkjan: kl. 11.00,*** Bergur D. Joensen
***Argir:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Kollafjørður:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Gásadalur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Porkeri:*** kl. 12.00,
***Leiti:*** kl. 13.00 altarg., Patrick de Neergaard
***Gøta:*** kl. 12.00, altarg., Martin R. Jacobsen

**Hebron, Argir**
Mánadagin 6. februar kl. 19.00 verður BeTwix. Hetta tiltak er fyri ungdóm í aldrinum 5.-8. flokk.
Mikudagin kl. 20.00 Uppbyggingar- og bønarmøti. Páll Poulsen talar.
Sunnudagin verður einki møti og eingin sunnudagsskúli vegna legu á Zarepta.
www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Suna Justinusen.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta - kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Karl Michaelsen, Fríða og Barbara syngja.

**Lívdin**
**á Brekku 3**
Týskvøldið kl. 20.00 Samkomufundur á Brekku 3.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 20.00 Møti undir heitinum »Ein nýggj byrjan« - Tummas Jacobsen talar.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17 Tímabøn.
Mikudagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 19.00 Chill.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn, einki ungdómsmøti vegna samklomulegu.
Eingi møtir sunnudagin vegna samkomulegu.
www.filadelfia.fo.

**KFUM og K í Havn**
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Mogens Tilsted Christensen. Evni: Sefanja profetur.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 20.00 í KFUK: DaSnakk, fyri ung.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Fríkirkjan Oasan**
**Kirkjustræti 4**
Mánadagin kl. 17.15-18.00 venur Barnakórið. Kl. 20.00 Bønarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími týskvøldið kl. 20.00.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti hjá Gündu og Kristen Johansen.
Hósdagin kl. 19.00 Barnaarbeiði.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 undirvísing og bøn.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mánakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Mikudagin kl. 17.30 Tim5.

Kl. 20.00 Húsmøti.
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Símun P. Jacobsen, kl. 11.00 Sunnudagsskúli.
Mána-, miku- og fríggjamorgun kl. 6.00-7.00 Bøn.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00, Awake við Jóhan Petur Jóhannesen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Hjørdis H. Petersen. Sangur við Sonju I. Jacobsen.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Zacharias Zachariassen talar. Evni: Villeiðing. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 7. februar kl. 19.00. Øll eru vælkomin at vera við.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Týsdagin kl. 19.30 Bíbliutími fyri ung.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti við Poul Nicolai Steinberg og Dávid Mørkøre.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 21.00 UngdómsRóp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Hvønn gerandidag kl. 6.15 er Morgunbøn.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 20.00 Ungdómsguðstænasta við altarg. í Christianskirkjuni. Kl. 21.30 Bønarløta.
Mikudagin kl. 6.15 Bønarløta, kl. 20.00 Bíbliutími við Jákup Petersen, evni: Frið við Gud, í skuld til menniskju. Róm. 1,14.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukøvldið kl. 20.00 Bíbliutími, Gal. 2. kap.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur.
Mikudagin kl. 18.00 Juniormøti, kl. 20.00 Heimaforbundsmøti.
Hósdagin kl. 17.00 Barna- og Ungdómskórið øvar.
Kl. 20.00 Á ferð við Bíbliuni v/ Magnus Jensen.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Føroysk møtir í DK**
**Samkoman Malta**
Esbjerg: Evangel. møti fríggjakvøldið 10. februar kl. 19.30 í Sædding Center.
Sønderborg: Leygarkvøldið kl. 19.00 Evangel. møti og sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting í Skolehjemmet á Søndre Landevej 28.
Vejle: Sunnudagin kl. 16.00 Breyðbróting og kl. 17.00 Evangel. møti í salinum hjá Frelsens Hær, Staldgårdsgade 4. Elsa og Poul Johan Djurhuus luttaka. Aftaná øll møtini bjóða vit drekkamunn og okkurt gott afturvið.
Hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 6. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 1, Hilda Frýdal
**kl. 14-15 Limir úr Nuuk kommunu vitja**
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, kánus o.o. spøl. Høvi er at koma sum gestur til døgurðan miku.- og fríggjadag. Tilm. mánadag á tlf. 316491.
***Tilm. til framsýningina á Listasavninum mikudag kl. 15.00 á tlf. 316491. Atgongumerki 40,-***
***Týsdagin 7. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Viðavøkstur í Føroyum og royndararbeiðið hjá Skógrøkt Landsins, Tróndur Leivsson, landsskógarvørður
***Mikudagin 8. februar***
kl. 10-13.30 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
***kl. 10-12.00 Skóleistadrekka og lagkøka. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
***kl. 15.00 Vitjan Mikines framsýningina. Frásøgufólk verður á staðnum. Møtast á Listasavninum kl. 15.00.***
***Hósdagin 9. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt á byrjunarstigi 2, Àsmundur V. Johannesen
kl. 14-17 Telduprát, vegleiðing á staðnum
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. ***Vit venja til kappingina, ið verður 18. mars á Nabb. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
***Fríggjadagin 10. februar***
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 10-12 Máling og tekning (havi tilfar við). Vegleiðing er á staðnum.
kl. 15.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
***Mánadagin 7. februar***
Opið hús
***Týsdagin 8. februar***
Telduprát. Bólkarnir møta sum avtala. Tilhaldið er opið sum vanligt.
***Mikudagin 9. februar***
kl. 15.00-16.00 er sangur, Martin Restorff Jacobsen spælir klaver. Sangbók Føroya Fólks.
Kl. 16.00 er Filmur: Fyrsti partur av Matador
***Hósdagin 10. februar***
kl. 15.00-17.00 Ættarprát. Tosað verður um Háldanstoft á Toftum.
***Fríggjadagin 11. februar***
kl. 15.00-16.00 Myndaútskering, Veving, máling. Annars er hvør vælkomin at hava okkurt annað við sær.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Eldrafelagið Kumlá**
á Skála hevur hugnaløtu í húsum felagsins týskvøldið 7. februar kl. 19.00.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
soljan@klaksvik.fo
soljan@post.olivant.fo
***Mánadagin***
kl. 14.00 Fimleikur
kl. 16.30 Sangur
***Tilm. til týsdagsdøgurðan áðrenn kl. 17 á tlf. 459091***
***Týsdagin***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 Vit lesa bløðini
kl. 12.00 Døgurði
***Mikudagin***
kl. 13.30 Telda
***Hósdagin***
kl. 10.00 Fimleikur
kl. 11.00 Telda
kl. 13.30 Vit lesa bløðini.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, kánus, o.m.a. Bløðini eru altíð til taks. Hvønn dag enda vit við andakt og sangi.*
**Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið Sóljuna**

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og ymisk spøl
***Mikudag***
Ymisk ítriv
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 6. februar***
Fimleikur og felagssangur
***Týsdagin 7. februar***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen
***Mikudagin 8. februar***
Boccia
***Hósdagin 9. februar***
Myndaveving v. Grethu Olsen
***Fríggjadagin 10. februar***
Byrjandi enskt v/ Anette Gaardlykke

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*


**P/f POUL MICHELSEN**

## GOYMSLUSTJÓRI

Vit sóknast eftir einum ágrýtnum og røskum fólki at hava ábyrgdina og dagligu leiðsluna av okkara goymslu og útkoyring.

Starvið sum goymslustjóri inniber í høvuðsheitum at:

- Fyriskipa alt arbeiðið á goymsluni
- Gera arbeiðsætlanir fyri goymslufólkini og bilførararnar
- Hava ábyrgd av goymslufólkunum og gera lønaravtalur
- Hava ábyrgd av, at allir ordrar verða avgreiddir og gjørdir klárir til útkoyring
- Samskifta við føroyskar kundar í samband við vøruútkoyringina
- Samskifta við føroyskar veitarar í samband við vørumóttøkuna

Starvið er spennandi og skiftandi, men eisini rættiliga umfatandi og krevst tí, at umsøkjarin hevur yvirlits- og fyriskipanareginleikar. Dámar tær avbjóðingar, og sóknast tú eftir einum góðum og tryggum starvi, vilja vit fegin koma í samband við teg.

Lønin verður ásett sambært avtalu, og goymslustjórin hevur tilvísing til leiðsluna.

Vinarliga vend tær til Poul Michelsen ella Gunnar Mohr á tlf. 314650, um spurningar ella ivamál eru.

Skrivlig umsókn kann sendast til:
P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 25. februar, og ætlanin er, at tú byrjar skjótast gjørligt.

**P/f Poul Michelsen**

*P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. Virksemið er í støðugum vøkstri, og tí verður vørumóttøku- og vøruútkoyringsparturin av goymslubygninginum í løtuni bygdur út. Ætlanin er eisini í næstum at byggja goymsluna meira út. PM er skipað í 5 deildir: Sølu-, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og útkoyringsdeild. Á goymsluni og í útkoyringini starvast íalt 15 fólk. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.*